## Freddie Mac rindar ráðgeva

Ein av størstu íløgufyritøkum í USA, kreppurakta Freddie Mac, hevur hvønn mánaða rinda 15.000 dollarar til leiðaran av valdystinum hjá John McCain, Rick Davis. Men republikanski forsetakandidaturin vísti hesum pástandi aftur sunnudagin og segði, at Rick Davis ikki hevur havt nakað við Freddie Mac í fleiri ár. – Hann hevur einki havt við Freddie Mac at gera síðani 2006, og eg lati fegin fortíð hansara kanna av hvørjum tað skal vera, segði McCain við CNBC og New York Times. Seinni nevnda sigur tó, at tvær ymsar keldur hava váttað at kenna til hesa avtaluna.



# Vinnulív íblástur úr ítrótti

**Spennandi fyrilestur verður við Katrin Olsen, rógvara, á FaroExpo, sum verður hildin í Runavík og Skálafirði seinnapartin í oktober**

FAROEEXPO
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyritøkurnar, sum luttaka á FaroExpo í Ítróttarhøllini í Runavík, verða skipaðar á básum, sum á eini vanligari framsýning. Men hesir básar verða ikki prýddir við ymiskum útboði, sum vit vanliga síggja á eini vanligari søluframsýning. Hvør básur er í staðin ein fundarstaður, har fyritøkur – útbjóðarar og keyparar – hava høvi at hitta hvønn annan.

Í góðari tíð undan FaroExpo verður fundarvirksemið neyvt skipað, soleiðis at ávís tíð er sett av til hvønn fundin millum ymisku fyritøkurnar, sum við eru.

Tað eru fyrireikararnir av tiltakinum, sum syrgja fyri, at fundarvirksemið verður sett upp í eina skipan, so flest møguligir fundir kunnu haldast.

### Katrin í Kelduni

Sjálvur ráðstevnuparturin verður ikki hildin í Ítróttarhøllini í Runavík, men í Kelduni í Skálafirði, har ymiskir fyrilestrar verða hildnir, meðan steðgur er í



*- Hvussu setir tú tær mál, hvussu nært tú tínum málum – og hvussu kann hetta yvirførast til vinnulívið. Keldi rógvarin fer at røða um hesar spurningar á FaroExpo-ráðstevnu í Kelduni*

úti í Runavík, soleiðis at allir luttakararnir hava høvi at verða við til ráðstevnuna.

Á ráðstevnuni hesaferð fer eitt nú kendi føroyski rógvarin, Katrin Olsen, sum rør á altjóða støði, at halda fyrilesturum evnið: "Hvussu kunnu mál flyta mørk".

Fyrilesturin verður hildin seinnapartin týsdagin, 21. oktober.

Katrin Olsen er 30 ára gomul, er útbúgvin lækni og hevur í nógv ár róð í frítíðini. Gjøgnum árini hevur hon sett sær strategisk mál, og hevur hon í ár luttikið í OL í Kina. Hon hevur víst, at til ber flyta seg frá føroyskum kappróðri til DM, HM og OL.

### Yvirførast til vinnulív

- Fyrilesturin hjá Katrini Olsen fer at snúgva seg um, hvussu tú setir tær tílík mál, og hvussu tú nært hesum málum – og at enda: Hvussu kann hetta yvirførast til vinnulívið? siga fyrireikararnir av FaroExpo.

Skráin fyri ráðstevnuna kann annars lesast á www.faroexpo.fo

# Dansikvøld á mentanarviku

**Aftur í ár verður skipað fyri mentanarviku í Runavíkar kommunu, og enn einaferð verður skipað fyri stórum dansitiltaki í ítróttarhøllini í Runavík**

TILTAK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Flestu okkara kenna góðu og gomlu slagararnar hjá Eyðuni Nolsøe og Terja Rasmussen, sum hava fingið fólk at svinga, dansa og syngja við í fleiri enn 20 ár.

Stóra dansitiltakið á mentanarvikuni í Runavíkar kommunu plagar rættiliga at savna fólk, og lítið er at ivast í, at tiltakið hesaferð, sum verður leygarkvøldið 25. oktober, fer at fáa eins stóra undirtøku og undanfarin ár.

Í øllum førum hava tey, sum skipa fyri mentanarvikuni, lagt seg í seðlan og hava fingið kend nøvn at framføra og undirhalda.

- Við bólkum sum Eyðun & Terja og Faktor 4 við Jens Marna kundu fortreytirnar ikki verið betri til eitt dansandi stuttligt kvøld í Runavík, sum bjartskygdu fyrireikararnir taka til.

Stóra dansitiltakið í Ítróttarhøllini er líka sum endabresturin á mentanarvikuni, har borðreitt annars verður við mongum ymiskum mentanarligum tiltøkum kring um í kommununi.

- Eftir eina rúgvu av listaframsýningum, konsertum og øðrum framsýningum,



*Teir hava fingið mong av svinga og syngja seinastu 20 árini. Saman við øðrum kendum nøvnum fara Eyðun og Terji at seta sín dám á stóra dansitiltakið í Ítróttarhøllini í Runavík*

kunnu ung og vaksin gleða seg til hetta stóra og afturvendandi dansi-og undirhaldstiltak.

Fyrireikararnir siga, at dansitiltakið í Ítróttarhøllini byrjar á midnátt leygarkvøldið 25. oktober og endar klokkan 04 á morgni. Atgongumerki, sum fáast við dyrnar, kosta 180 krónur.

## Áhugaverdir fyrilestrar

FYRILESTRAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár vórðu tveir áhugaverdir fyrilestrar hildnir á Fiskirannsóknarstovuni. Tað vóru tey bæði, professarin Eric P. Achterberg (National Oceanographic Centre, Southampton) og føroyska Maria C. Nielsdóttir, PhD-lesandi á sama stovni, ið hildu hesar fyrilestrarnar.

Maria C. Nielsdóttir las evnafrøði á Náttúruvísindadeildini, áðrenn hon fór til Danmarkar at lesa til sivil verkfrøðing í evnafrøði.

Seinastu tvey árini hevur hon verið PhD-lesandi á National Oceanography Centre (NOC) í Southampton í Suðuronglandi.

Sum partur av PhD-lestrinum hevur Maria C. Nielsdóttir verið á rannsóknarferðum, bæði í suðurhøvum og í Norðuratlantshavinum.

Sosialurin fer at venda aftur til hesar fyrilestrar.



*Eric P. Achterberg og Maria C. Nielsdóttir Mynd: Mourits M. Joensen*